gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Langt millum orð og avrik

– Danski blokkstuðulin hevur avskeplað samfelagsbygnaðin. Hann hevur verið brúktur sum kunsttøð at vaksa um tann almenna sektorin, sum er alt ov stórur samanborið við tann privata sektorin.

Hetta er boðskapurin hjá Bjarta Mohr. Fyrrverandi tjóðveldismaðurin stillar upp til løgtingsvalið fyri Fólkaflokkin. Poul Michelsen bjóðaði herfyri av. Um eingin annar fullveldismaður stillaði upp, fór hann at stilla upp. Men nú fær hann kapping frá vinnulívsmanninum í Álakeri, sum mælir til fullveldi fram um hugsjónarligt kegl!

Eitt eyðkenni fyri summar nýggjar politikkarar er, at teir leggja sjógv millum seg og politikkin hjá flokkinum. Finnur Helmsdal ger tað bæði á almanna og vinnuliga økinum, og nú síggja vit Bjarta Mohr gera tað sama. Harafturat eru teir samdir um, at ríkisveitingin er rótin til alt ónt. At hon hevur verið við til at menna hetta samfelagið, verður ikki grett eitt orð um. Eitt eyðkenni fyri tey, sum neyvan hava upplivað, at tímalønin ikki røkkur til, ella at uppiløgur hava forðað fyri, at súltitoy kom á borðið!

Tað er ikki nakað nýtt, at peningur, stuðul ella veiting, sum kemur inn í eitt samfelag, uttan at arbeiði á staðnum liggur aftan fyri, er ikki gott fyri ein búskap. Men at ríkisveitingin hevur avskeplað samfelagsbygnaðin er ein pástandur, sum er ringur at prógva. Í øllum framkomnum londum tykist almenni sektorurin at bólgna.

Eisini í Føroyum! Men neyvan er almenni sektorurin vaksin so nógv sum hesi seinastu 5 árini, Fólkaflokkurin hevur sitið í landsstýrinum og havt landsstýrismann í fíggjarmálum og løgmann. Hesi ár er almenni sektourin bólgnaður. Vit opna ikki eitt blað uttan at detta yvir lýsingar eftir fólkum til miðfyrisitingina, einum riðili av lýsingum eftir pedagokum, starvsfólkum o.s.fr. o.s.fr.

Bjarti Mohr kann ikki ábyrgjast tann politikk, sum Fólkaflokkurin hevur rikið, men ikki skerst burtur, at í meiri enn 30 ár hevur Fólkaflokkurin sitið í landsstýrinum undir tí 53 ára gomlu heimastýrisskipanini.

Í hesa tíð hevur Fólkaflokkurin havt allar møguleikar at skerja ella taka av ríkisstuðulin. Men hann hevur ikki gjørt eitt tað einasta átak at lækka stuðulin, tvørturímóti. Ja, tað fyrsta hetta fullveldislandsstýrið gjørdi var at hækka ríkisveitingina meiri enn 100 milliónir krónur. Men nú, tá tað sansar at hjá landsstýrinum, og einki er vunnið á fullveldisleið, skal blokkurin skerjast í panikki 3-400 milliónir. Tað fær ongar avleiðingar, siga teir ófeilbariligu. Men sum vinnulívsmaður veit Bjarti Mohr, at tað fær avleiðingar, um ráfiskanøgdin minkar 25 prosent. So tað er kanska ein vón fyri, at hann fær tosa menn til fornuft, og letur okkum byrja í stigum við 100 milliónum næsta ár. Orðini eru føgur, men langt er til avrikini hjá Fólkaflokkinum á umrøddu økjum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nøkur fá orð um útbúgvingarkostnað

**Jákup Fróði Djurhuus**



### - Tey múgvandi í skúla, tey fátæku á torvkassan....!

Hvaðani skal sitandi samgonga útvega minst eina hálva milliard til skúlan eftir 1. januar, samstundis sum teir ætla at lækka blokkin við 400 mió kr?

Teir hava ein trupulleika. Ein álvarsligan trupulleika. Um nakrar fáar dagar ætla teir sær til Danmarkar at yvirtaka eina røð av málsøkjum í einari handavend. Uttan at spyrja fólkið fyrst. Og uttan nakra sum helst varandi fíggjarliga fyrireiking.

Skúlaøkið er bert eitt dømi úr rúgvuni. Her væntar peningur í longu nú til at fylla tímatalvuna út í barnaskúlanum. Eisini bleiv tað við neyð og deyð fingin ein játtan til vega, at taka ein skúlaflokk upp úti á læraraskúlanum.

Tað tykist rættiliga høpisleyst, tá ið man samstundis tosar um at yvirtaka alt skúlaverkið.

Raksturin av økinum útbúgving og gransking kostar á fíggjarlógini 2001 við umsiting og lestrarstuðli: 527,5 mió kr.

Einir 9000 føringar ganga í skúla herheima – t.v.s. at hvør næmingur kostar 58.611 kr um árið í meðal.

Og í dagsins vitjanarsamfelag, mást tú ganga minst 13 ár í grundskúla áðrenn tú byrjar í lívsins skúla.

Sostatt kostar tað 58.611 kr x 13 ár x 9000 næmingar = 6,8 milliardir kr at fáa ein hóp uppá 9000 føringar undan í grundskúlanum.

Og tað gerst ikki bíligari sum tíðin gongur, og krøvini vaksa.

Síðani stuðulsstovnurin í 1988 byrjaði at áseta útgjaldið fyri SU til Føringar, sum lesa í Føroyum, er gjaldið siglt afturúr við 14.613 kr um árið.

Tann føroyski lesandi í Føroyum fær:
3153 kr x 11 mánar = 34683 um árið.

Tann Føroyski lesandi í Danmark ella í td Ìslandi fær frá SU í Danmark útgoldið.
4108x 12 mánar = 49296 kr um árið.

Ein munur uppá 14613 kr um árið higartil.

### Ìslendingurin fær onki:

Sostatt kann føringurin, sum lesur í Íslandi , koma næstan skuldafríur útaftur úr skúlanum, takka verið lestrarstyrkinum úr Danmark, ímeðan tann hálvi føroyingurin, sum er Íslendskur ríkisborgari, og sum situr undir liðini á honum, ikki fær eitt klovið oyra nakrastaðni, men kemur útaftur við stórari skuld at dragast við.

Síggið í bløðunum um dagarnar, at ein tingmaður tjóðveldisfloksins mælir til at smíða eina sera »bíliga føroyska skúlalóg«, sum »hóskar til okkara viðurskifti«. Legg hana fram, sum skjótast, um álvari býr aftanfyri orðini.

Tí, minnist meg rætt, hevur eitt samt løgting samtykt verandi skúlalóg.

Aðalendamálið er loysing, so fara vit víðari, kann sigast, at:

Eitt stað ímillum 1200 og 2000 føringar útbúgva seg í Danmark.

Brúka vit tað lægra talið, fáa hesir 1200 lesandi einar 60 mió kr í lestrarstyrki um árið uttan nakað hóvasták.

Og hetta er umframt fría barnaansing, boligsikring v.m.

Man roknar við, at ein akademisk útbúgving, kostar minst eina hálva, og allahelst uml 1 mió kr.

Brúka vit tey lægru tølini, so kostar tað danska samfelagnum einar 600 mió kr at útbúgva ein hóp uppá 1200 føringar – helst nærri tí dupulta.

Sitandi samgonga roynir av øllum alvi at sleppa okkum av við hesi grundlógartryggjaðu rættindi , sum vita hava »á jøvnum føti« við Danmark og Grønland, og gera okkum til part av einari norðurlendskari skipan, sum ikki inniheldur nærtil so nógvar fyrimunir.

Ella er ætlanin við fullveldinum, at venda aftur til ta tíðina, tá ið børnini hjá teimum múgvandi fingu sær útbúgvingar, meðan børnini hjá teimum við ongum pengum, men við góðum evnuum, blivu sitandi eftir á torvkassanum?

Tað sum eg vil siga við hesum, er, at tað ber ikki til at loypa av stað í óðum verkum bara tí at eitt løgtingsval er í nánd.

Ps: Í India, har 40% av fólkinum verða mett at vera analfabetar, er útbúgvingarøkið allíkavæl størsta einstaka útreiðslan.

# Viðvíkjandi steingjan av psykiatriskum deildum ávís tíðarbil

MÓTMÆLISSKRIV

Undirritaðu feløg, ið saman við Sinnisbata eru í bólkinum sálarlig brek í MBF, loyva sær við hesum at taka undir við mótmælinum, ið Sinnisbati hevur sent í samband við, at aftur í ár er ætlanin at stongja deildir, har – sálarliga sjúkir – sjúklingar eru innlagdir, partvís búgva.

Undirritaðu feløg meta henda bólkin, sum ein av teimum veiku í samfelagnum. Sinnisbati hevur við sínari vitan, fleiri ferðir víst á vandan, men teirra ynskir verða skúgvað til viks.

Vit feløg í bólkinum sálarlig brek vilja enn einaferð vísa á, at tey ið eru sálarliga sjúk eiga at hava eitt trygt umhvørvi, og frá dugnaligum starvsfólki at fáa bestu viðgerð. Bæði tryggleikin og viðgerðin hjá tí einstaka er í vanda við hesi flyting.

Á øllum viðgerðarstovnum eigur at verða farið fram við endamálinum: »Einstaklingin í miðjuna«. Hetta skriv er ein áheitan, um at steðga við at flyta sálarliga sjúk runt, uttan at tað er til nakað, ið er betri fyri viðgerðina hjá tí einstaka.

Virðingarmest

Autistafelagið v/Óluvu Vilhelmsen, nevndarl.
MBD/damp v/Báru Johansen, form.
Javni v/Dianu í Puntabyrgi, form.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



# Yvirlýsing frá evangeliska samtakinum: Karisma

Vit ynskja við hesi yvirlýsing at siga frá misnøgd okkara í samband við sjónvarpsupptøku av møti á hvítusunnu, har vit ikki fingu loyvi at nýta tann heimskenda prædikumannin Arild Edvardsen sum tara.

Viðvíkjandi upptøkum av møtum og gudstænastum er ein samtykt sum sigur, at tilfarið skal vera føroyskt. Hetta halda vit bæði vera rætt og rímiligt, og vit hava altíð hildið okkum til hesa samtykt. Men tað er heilt órímiligt at tað ikki ber til at gera undantøk. Vit hava bæði skrivliga og munnliga gjørt hvat vit kundu fyri at upplýsa Sjónvarp Føroya, at Arild Edvardsen er góðkendur prædikumaður um allan heimin. Hann hevur havt fundir við stjórnarleiðarar í hópatali – bæði kendum og ókendum – og hann hevur megnað at boðað kristniboðanina langt inn í tann muslimska heimin, bæði við møtum og við sjónvarpsendingum. Hann verður góðtikin sum talari í sjónvarpi runt allan heimin, og trúboðaravirki hansara hevur ávirkað allan tann afrikanska heimspartin, allan tann russiska heimspartin og nú serliga tey muslimska londini.

Við hesum í huga er tað ófatiligt at Sjónvarp Føroya ikki vil gera undantak at ein slíkur persónur kann tosa til okkum føroyingar, og serliga er tað harmiligt, tá vísast kann á, at Sjónvarp Føroya gevur øðrum undantaksloyvi. Vit kunnu ikki góðtaka at bert vit trúgvandi, skulu bera tað føroyska tilfarið uppi í sjónvarpinum, tí vit vita øll, at burtursæð frá barnasendingum, Degi og Viku og møtum, so er lítið annað føroyskt tilfar.

Sjónvarpið hevur víðka senditíðina fleiri ferðir, men heilt frá byrjan hevur senditíðin við kristiligum innihaldi verið óbroytt. Sjónvarp Føroya veit líka væl sum vit, at flestu føroyingar eru trúgvandi, og tessvegna átti tilfarið við kristiligum innihaldi at vaksið í mun til víðkaðu senditíðirnar. Vit vilja tí við hesi yvirlýsing heita á Sjónvarp Føroya um at broyta hugburð.

Dánial á Dul Jacobsen,
Evangeliihúsið Havn
Pauli Høj,
Keldan Skálafjørður
Símin Jacobsen,
Lívsins Orð Runavík
Einar Joensen,
Betania Skopun
Fríðtór Debes,
Rhema, Havn
André Matras,
Getsemane, Klaksvík
Erling Bech,
Sion, Vágur
Jón Miðberg,
Saron, Vestmanna
Tummas Jacobsen,
Filadelfia, Havn

# Sjúkrahjálparafelagið broytt navn til Almanna- og Heilsurøktarfelagið

AHF ALMANNA-OG HEILSURØKTARAFELAGIÐ
*Fríbjørg Jacobsen, form.,*

Boðað verður við hesum frá, at Føroya Sjúkrahjálparafelag hevur broytt navn sítt til AHF, Almanna- og Heilsurøktarafelagið.

Aftan á at løgfrøðingur hevur gjørt eina tulking av lógum felagsins, og fínteljing av brævatkvøðunum er farin fram, kunnu vit staðfesta, at tær lógarbroytingar, sum samtyktar vórðu á aðalfundinum 24.04.2001, nú eru endaliga samtyktar við brævatkvøðugreiðsluni.

Umframt navnabroytingina eru ásetingarnar í lógum felagsins um, hvussu lógarbroytingar framyvir skulu fara fram, eisini samtyktar.

Fjølmiðlarnir hava áður fingið upplýsingar um, at broytingarnar ikki vórðu samtyktar, men hetta er ikki rætt, tí tulkingin av lógum felagsins hevur, sum frammanfyri nevnt, staðfest, at tann meiriluti, sum kravdist, hevur atkvøtt fyri uppskotunum á brævatkvøðugreiðsluni. Nevndin harmast um hesa misskiljing.

# Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni

**Ingi Gunnarsson**

Fyrsti sunnudagur í 2000 varð hildin sum ”minningardagur teirra deyðu í ferðsluni”, ætlanin er at endurtaka tiltakið aftur í ár. Fyrsti Sunnudagur í ár er 1. juli.

Í fjør vórðu løgd blómutyssi við vanlukkustøð í Eysturoy og Streymoy, tó var tiltakið avmarkað til tíðarskeiðið 1980 til 2000 av tí at peningur ikki var til meira.

Í ár er so ætlanin at røkka alt landið, tó eru vit ikki kunnug um øll vanlukkustøð. Til tess at røkka málinum, verður tørvur á meiri peningi og hjálp, til at leggja út blómutyssi.

Vit vilja við hesum tiltaki vísa á, at ferðslan krevur alt ov mong mannalív og royna at ávirka bilførarar, ferðsluni til bata og á ein stillføran hátt, minnast tey sum farin eru.

Tiltakið fekk góða undirtøku í fjør, og varð heitt á okkum um at halda fram.

Møguleiki er at stuðla tiltakinum við peningagávu á konto 9181-1313500 í Føroya Sparikassa.

Ella við at leggja blómur, har tey hava mist ein av sínum. Tað er eisini tørvur á hjálp til at leggja blómurnar út, og til seinast so vantar okkum staðkent folk til at vísa okkum á hvar vanlukkarnar eru hendar, hetta er tó mest galdandi fyri vanlukkur hendar fyri mongum árum síðani.

# Clickhaze á mini-konsertferð

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Tveir mánaðir eru farnir, síðan eitt fullsett Norðurlandahús varð vitni til, at Clickhaze gjørdist vinnari av Prix Føroyar finaluni. Umframt at fáa tillutað fyrstaplássið, samdust umboðini frá Nibe Festivalinum um at bjóða Clickhaze við sum gesti til Nibe at spæla.

Bólkurin hevur síðani vant nógv og kennir seg til reiðar at trína pallin í Nibe. Clickhaze skulu spæla á Nibe fríggjakvøldið 29. juni kl. 23.00. Bert eitt annað orkestur spælir samstundis sum Clickhaze seint fríggjakvøldið, so møguleiki skuldi verið til staðar fyri, at nakað av fólki kemur at lurta.

Men føroyingar fáa høvi at hoyra Clickhaze, áðrenn tey fara til niður.

Clickhaze fara nevnliga at spæla tríggjar konsertir í vikuskiftinum. Á henda hátt hava tey møguleikan at royna skránna fyri fólki, áðrenn leiðin verður løgd til Danmarkar.

Fríggjakvøldið 22. juni kl. 21.00 spæla Clickhaze í losjuni í Gøtu, har Kári Sverrison leggur fyri.

Leygardagin 23. juni spæla Clickhaze útikonsert á Jóansøku á Tvøroyri saman við m.a. ársins songrødd, Flux og Revival.

Seinasta konsertin áðrenn Danmarkarferðina, verður sunnukvøldið 24. kl. 20.00 í Meiarínum í Tórshavn, har Unn Patursson eisini verður at hoyra.

Týsdagin 26. juni fara Clickhaze til Danmarkar.

# Verkfrøðingar og arkitektar nýggjan sáttmála

TÍÐINDASKRIV

Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag saman við Arkitektafelag Føroya skrivaðu í gjár undir semju.

Sáttmálin hevur gildi til 1. oktober 2003 (t.e. 2 ár og 7 mánaðir). Semjan fatar m.a. um:

Lønarhækking, sum í miðal er 12% í sáttmálaskeiðnum.

Avtalu um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu. Her er dentur lagdur á ein aktivan starvsfólkapolitikk, ið skapar grundarlag fyri góðum trivnaðar- og menningarmøguleikum hjá almennum starvsfólki, og sum leggur dent á sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti.

Harumframt eru eisini gjørdar smærri tillaðingar í sáttmálanum.

Sáttmálaøkið er víðkað, soleiðis at tað nú fatar um bæði verkfrøðingar og arkitektar.